ATLANTIC AIRWAYS
SUMMARKAPPINGIN '09
**Stóra summarkappingin hjá Sosialinum**
Send inn og vinn nógvar flottar vinningar



# **Eyguni** fáa eisini sítt



**Við glas- og aluminiumskúluni hvílandi á fýra risastórum súlum er Perlan eisini nakað serstakt uttanífrá**



**Eisini innan er talan um framúr vakran arkitektur. Myndin her er tikin av gólvinum í forhøllini**

**Perlan telist millum mongu góðu matarstøðini í Reykjavík. Men fram um alt er tað arketektoniska listin og útsýnið, sum hava brandað matstovuna sum nakað heilt serligt**

**ÍSLAND**

**Jákup Mørk**
jakup@sosialurin.fo

Síðani hon varð bygd í 1991, hevur Perlan staðið sum ein varði yvir Reykjavík. Lokalu íbúgvarnir nýta fegnir staðið, tá okkurt serligt er á vási, og fyri útlendsku ferðafólkini, sum leggja leiðina til Íslands, er matstovan eitt must á vegnum. Ikki minst fyri at hava eina mynd, sum kann vísast fyri vinum og kenningum eftir heimkomuna.

Ikki fyri at undirmeta matin, sum er at fáa staðnum. Tí talan er veruliga um góðar máltíðir. Men tað er fyrst og fremst visuelli parturin av upplivingini, sum er nakað serligt við Perluni.

Staðsetingin á heygnum, sum liggur skamt frá flogvøllinum er í sjálvum sær serlig. Her er gott útsýni yvir allan býin, og landslagið mest sum leggur upp til, at her skuldi ein serstakur varði byggjast.

Sjálv matarstovan er ovari parturin av eini hálvkúlu, sum hvílir á fýra risa-stórum súlum. Í alumunium og glasi gevur kúlan eitt frálíkt útsýni yvir býin, og hetta útsýnið er fyri allar gestirnar. Eitt útsýni, sum er fyri øll, tá gólvið hjá gestunum spakuliga melur runt, soleiðis at gestirnir umframt matin fáa eina sanna panorama-uppliving yvir Reykjavíkar bý, meðan etið verður.

Hóast matstovan við framúr brandingini telist millum tær dýraru í Reykjavík, so er hon framvegis ikki dýrari, enn gott er. Serliga ikki, tá lági kursurin á íslendsku krónuni verður íroknaður. Soleiðis kann ein máltíð við fýra rættum umframt víni fáast fyri ein lítlan 500-krónuseðil, og tað er nú slettis ikki so galið í dagsins europiska samfelag.

Og er pengapungurin ella tíðin ikki til tí heilt rúgvusmiklu restaurationsvitjanina, so er eisini ein góð cafeteria í Perluni. Tá fæst roterandi gólvið ikki við í keypinum, men hóast talan tá er um uppliving í niðara partinum av hálvkúluni, so er útsýnið framvegis framúr.

Vika 22:
Leiðin til Reykjavíkar
8 síður við spennandi tilfarið um summar

## Í top-5

**Enska blaðið, the Indipendent, hevur sett Perluna í Reykjavík á listan yvir 5 tær bestu "top-floor" matstovurnar í heiminum. Her er Perlan í fínum selskapi við the Portrait Resturant í London, Sirrocco í Bangkok, Tower Top í Zanzibar og Maison Blanche í Paris**

Melda teg til Club Atlantic og
VINN FERÐASEÐLAR
og fá sertilboð sendandi við telduposti
Øll, sum tekna seg, eru við í lutaksti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.
Melda til á: www.atlantic.fo



Tel 34 10 00
ATLANTIC AIRWAYS
atlantic.fo